# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Millumskúla-flokkur í Viðarlundini

Her er ein av myndunum frá stóru realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í summar. Ein millumskúlaflokkur í Viðarlundini umleið 1954.

**Aftast f.v.:** *Jóannes Danielsen, Karl Erik Mortensen, Árni Hansen og Thorstein Arge*

**Miðraðið f.v.:** *Ludvig Peteren, lærari, Petur Hans Petersen, Zacharis Poulsen, Johan Restorff, Poul Johan Poulsen og Vagnar Olsen*

**Fremst f.v.:** *Hans Danielsen, Jákup Thomsen, Kim Lützen, Poul Mikael Poulsen og Hendrik Rubeksen*

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024.

*Myndaeigari: Kinn Magnussen*

Sosialurin fyri 25 árum síðan:

## Gustav Vasa byrjar summar-siglingina í mai


tíðindablaðið
sosialurin
56. árg. ★ kr. 4,-
Nr. 14 ★ hósdagur 3. februar 1983

# Gustav Vasa byrjar summarsigling í mai

## Sune Joensen stjóri á Bruna-tryggingini

Hósdagin 3. februar 1983 stendur á forsíðuni á blaðnum, at Gustav Vasa byrjar summarsiglingina í mai, um landsstýrissamgongan ger semju í skipamálinum.

Gustav Vasa er 10 ára gamul og keypsprísurin liggur um 120 milliónir krónur. Skipið siglir 22 míl, hevur pláss fyri 1050 ferðafólkum og kann taka 250 bilar.

Sum øll vita, kom skipið til Føroya og fekk navnið Norrøna. Í dag eitur skipið Logos Hope.

Blaðið skrivar eisini at Sune Joensen var mikudagin valdur til nýggjan stjóra í Føroya Brunatrygging. Hann tekur við eftir Jarmund Thorsteinson sum fer frá fyri aldur.

Tað er ikki lætta hjá klædnaídnaðinum í Føroyum. Tvær fyritøkur, sum hava gjørt bundnavørur hava snarað lykilin fyri seinastu ferð. Tær eru Anja í Gøtu og Sally í Klaksvík. Orsøkin var at tær vóru ikki kappingarførar við innfluttu vørurnar.

Havnar Sjónleikarfelag sýnir leikin Tilvildin fyri seinastu ferð.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin